# SamVit fer út at ferðast

Ein av stóru ætlanunum fyri 2008 í SamViti er ein rundferð í Føroyum. SamVit ynskir við hesum at læra eldsálirnar betur at kenna, síggja hvat gott tey goyma kring Føroya land og hvat fólk hava at bjóða, sum kann vera áhugavert fyri onnur. Mikudagin 20. februar fer rundferðin av bakkastokki.

Rundferðin byrjar í Sandoy og endar í Havn síðst í mai. Endamálið við rundferðini er at koma í samband við lyklafólk innan ymisk økir, t.d. innan vinnu, ferðavinnu, íverksetaravirksemi, bygdaráð og mentan.

Umframt at hitta lyklafólk úr etableraðu vinnunum, vil SamVit fegin læra spírarnar betur at kenna kring Føroya land og síggja hvat gott tey goyma av tilfeingi, talenti og góðskuvørum. Rundferðin er somuleiðis eitt gott høvið at greiða frá, hvussu SamVit kann samstarva við tær ymisku vinnurnar – og harvið eggja til netverkan og samstarv. Henda rundferðin verður gjørd fyri at fáa eitt enn tættari samstarv millum SamVit og vinnuna. Ætlanin er at halda fundir og skapa íblásandi forum fyri netverkan, har skift verður um royndir og annað. Harumframt er SamVit í ferð við at fyrireika eina tørvskanning, har tørvurin hjá vinnuni verður kannaður.

Fyribils ferðaætlanin fyri rundferðini er henda: Í viku 8 verður vitjað í Sandoy og Skúvoy, viku 10 í Norðuroyggjum, viku 13 í Suðuroy, viku 15 í Norðurstreymoy og í Norðeysturoy, viku 18 í Vágum, viku 20 í Suðureysturoy og í viku 22 í Tórshavn.

Sum framhald av rundferðini er ætlanin at skipa fyri bæði vinnuligum og mentanarligum tiltøkum í heyst, saman við lokalu kreftunum og varpa ljós á hvørt øki og harvið sjónliggera og marknaðarføra virksemið í hvørjum øki fyri restini av Føroyum og úteftir eisini.



*Fyrsta vitjanin hjá SamVit verður í Sandoynni seinni í hesum mánaðinum*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri, seinnapartin lækkar hann niður í útsynning. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Skrið ella stormur av suðri og útsynningi og regn eitt skifti. Út á seinnapartin minkar hann vindin niður í stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri og regn. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Upp í hvassan vind av útsynningi, sunnudagin minni vindur. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 4 og 8 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -16 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -3 |
| Ammassalik | -10 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 6 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 14 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 1 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 7 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 10 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 979 hPa. yviri á Suðurlandinum fer spakuliga eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 981 hPa. yvir Írlandi fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer í landnyrðing og gevur nógvan vind á okkara leiðum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 3/2 kl. 06[00] – 4/2 06[00]. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í februar: 11°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 3/2 kl. 06[00] – 4/2 06[00].
Avfallið higartil í februar: 15 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 30. jan | Seinna kvarter |
| 31. jan | Mánin longst frá jørðini |
| 7. feb. | Tendring |
| 14. feb. | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. feb. | 05.15 | 17.39 | 04.15 | 16.39 | 04.30 | 16.54 | 07.15 | 19.39 | 08.15 | 20.39 | 03.30 | 15.54 | 02.30 | 14.54 | 05.30 | 17.54 | 06.30 | 18.54 | 05.00 | 17.24 | 06.15 | 18.39 |
| 6. feb. | 06.02 | 18.25 | 05.02 | 17.25 | 05.17 | 17.40 | 08.02 | 20.25 | 09.02 | 21.25 | 04.17 | 16.40 | 03.17 | 15.40 | 06.17 | 18.40 | 07.17 | 19.40 | 05.47 | 18.10 | 07.02 | 19.25 |
| 7. feb. | 06.47 | 19.01 | 05.47 | 18.01 | 06.02 | 18.16 | 08.47 | 21.01 | 09.47 | 22.01 | 05.02 | 17.16 | 04.02 | 16.16 | 07.02 | 19.16 | 08.02 | 20.16 | 06.32 | 18.46 | 07.47 | 20.01 |
| 8. feb. | 07.31 | 19.52 | 06.31 | 18.52 | 06.46 | 19.07 | 09.31 | 21.52 | 10.31 | 22.52 | 05.46 | 18.07 | 04.46 | 17.07 | 07.46 | 20.07 | 08.46 | 21.07 | 07.16 | 19.37 | 08.31 | 20.52 |
| 9. feb. | 08.12 | 20.32 | 07.12 | 19.32 | 07.27 | 19.47 | 10.12 | 22.32 | 11.12 | 23.32 | 06.27 | 18.47 | 05.27 | 17.47 | 08.27 | 20.47 | 09.27 | 21.47 | 07.57 | 20.17 | 09.12 | 21.32 |